## Bíligari at keypa nýggjan bil



Vanliga siga vit, at einki er so ringt, at tað ikki er gott fyri okkurt, og bretar kunnu nú sanna, at soleiðis er eisini við fíggjarkreppuni. Tí í Bretlandi kann tað nú vera bíligari at keypa sær ein nýggjan bil heldur enn ein gamlan. Hetta er ikki galdandi fyri øll bilmerki, men eitt nú kunnu keyparar spara umleið eitt túsund pund við at keypa ein nýggjan Vauxhall Corsa (enska útgávan av Opel Corsa) heldur enn ein, sum hevur koyrt nakrar túsund kilometrar, skrivar Reuters. Sum dømi verður nevnt, at ein spildurnýggjur Vauxhall Corsa kostar 5.995 pund, meðan ein, sum hevur koyrt 3.500 kilometrar, kostar 6.495 pund.

## Sjórænarar lova hevnd

Teir somalisku sjórænararnir hótta við at hevna teir tríggjar sjórænararnar, sum amerikanskir herflotamenn skutu, tá teir fríaðu Richard Phillips, skipara Sjórænararnir eru sera misnøgdir við amerikonsku framferðina, tí álopið bleiv sett í verk, meðan ein av sjórænarunum var umborð á amerikanska herskipinum Bainbridge og tingaðist um treytirnar fyri at lata Richard Phillips leysan. Men ístaðin fyri at samráðast við hann tóku amerikanararnir sjórænaran til fanga og skutu hinar tríggjar, sum vóru í bjargingarbátinum saman við amerikanska skiparanum. Somaliskir sjórænarar hava rænt meiri enn tólv onnur skip og hava mist 200 útlendskar sjómenn gíslar. Summir eygleiðarar halda, at amerikanska álopið kann gerast hættisligt fyri hinar gíslarnar.

# u 400.000 í bót



*- Onkur skipari vendir sær beinleiðis til vaktarskipini hjá okkum, eins og onkur vendir sær til Fiskiveiðieftirlitið. At útlendskir skiparar vilja tryggja seg við at spyrja seg fyri, tá teir koma í føroyskan sjógv, er nakað, sum hendir av og á, siga tey á Fiskiveiðieftirlitinum*

*Mynd: Aksel á Botni*

fiskiveiðisáttmálanum millum Føroyar og ES, og hevði bráfeingis veiðibann ikki verið lýst, høvdu skipini eisini havt loyvi at fiskað á hesi leið á Munkagrunninum.

- Vanliga boða vit skipum, ið fiska á leiðum, sum verða stongdar eftir hesi kunngerð, frá, tá veiðibannið verður lýst. Sama er við skipum, sum fiska nærindis. Tá fáa tey stundir at gevast og rýma, áðrenn bannið gerst effektivt.

Á Fiskiveiðieftirlitinum siga tey, at hetlendsku ísfiskatrolararnir vóru komnir í føroyskan sjógv, eftir at veiðibannið varð lýst.

Nevnda leið á Munkagrunninum er stongd fram til 20. apríl.



*Polarhav, Stjørnan, Eysturbúgvin og Vesturbúgvin hava longu gjørt tveir gulllaksatúrar hvør*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Gulllaksarok aftur í Leirvík

**Leirvíkingar eru aftur farnir í gulllaks, og seinastu dagarnar hava tey havt úr at gera á Tavuni**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Hóast apríl mánaði ikki heilt er hálvrunnin enn, er Tavan í Leirvík longu farin at arbeiða gulllaks.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin landaðu fyrstu ferð 8. apríl, og tá høvdu skipini 345.000 pund tilsamans. Skipini vóru inni aftur í gjár, og tá hevði Eysturbúgvin, sum landaði hjá Beta, eini 230.000 pund og Vesturbúgvin, sum landaði á Toftum, hevði umleið somu nøgd.

Polarhav og Stjørnan hava eisini verið á gulllaksi. Skipini landaðu fyrstu ferð langa fríggjadag, tá tey høvdu 430.000 pund tilsamans. Skipini eru inni aftur í dag við stórari last.

Á Tavuni í Leirvík hava tey havt úr at gera, nú gulllaksavertíðin byrjaði beint undan páskahalguni.

Arbeitt hevur verið í skiftivaktum, men virkið hevur ikki megnað at tikið ímóti øllum gulllaksinum, sum higartil er landaður.

Sum skilst, hevur Atlantis í Vestmanna eisini heilfryst ein part av gulllaksinum, sum tey fýra skipini hava landað.

Eysturbúgvin og Vesturbúgvin, sum partrola og Polarhav og Stjørnan, sum eisini partrola, hava soleiðis landað tvær ferðir, síðan skipini fóru á gulllaks fyri bert fáum døgum síðan.

Á landingarmiðstøðini hjá Beta landaðu tey annars Heyk og Falk 6. apríl. Hetta var ein góður túrur, stívliga 500.000 pund av upsa tilsamans.

Undan halguni landaðu eisini Rókur, Lerkur, Stelkur, Bakur og Jaspis og Ametyst.